# Ert tú elektrisk/ur?

## Vit søkja eftir elektrikara og elektrikaralærlingi

Install er ein fyritøka í støðugum vøkstri, og tí sóknast vit eftir tveimun dugnaligum starvsfólkum afturat: einum elektrikara og einum elektrikaralærlingi.

**Arbeiðsøki**
Install veitir eina breiða tænastu, og vit hava serfrøði á nógvum økjum. Tænastur okkara umfata m.a.: El-innleggingar, termografering, eftirlits- og ávaringarskipanir, stýringar til maskinur og skipanir, neyðstreyms- og dieselgeneratorar og mekaniskt arbeiði.

**Førleikakrøv**
Um tú hevur hug at arbeiða hjá okkum, er tað ein fyrimunur, um tú ert nærløgd/nærlagdur og ábyrgdarfull/ur og kanst vera tøk/ur, tá á stendur. Neyðugt er at hava koyrikort.

***Elektrikarin, sum verður settur í starv:***
- er útbúgvin elektrikari ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur royndir frá líknandi arbeiði
- dugir og hevur hug at arbeiða sjálvstøðugt
- torir at taka avgerðir

Løn sambært avtalu.

***Elektrikaralærlingur, sum kemur í læru hjá okkum:***
- skal í minsta lagi hava 9. flokk - helst SIT
- hevur áhuga fyri el og mekanikki

**Setanartreytir**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Svend Hentze á tel. 50 58 01. Umsóknarfreistin er mán. 8. sept., og størvini verða sett skjótast gjørligt.

Umsóknir skulu sendast til:
Install sp/f
Rundingur 20
Álaker
FO-100 Tórshavn

ella til install@install.fo



Install varð stovnað í 2003 og í løtuni starvast 7 starvsfólk við hollum starvsroyndum hjá okkum. Vit hava breiðan førleika og breitt virkisøki í Føroyum, og vit átaka okkum alt frá stórum verkætlanum til serloysnir til smærri virki.

INSTALL
www.install.fo

---

HTM HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN



## Skrivstovufólk
### til Hjálpartólamiðstøðina

**Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur, og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

Eitt av starvsfólkum okkara hevur leitað sær aðrar avbjóðingar og er tí á HTM eitt fyribilsstarv sum skrivstovufólk leyst at seta beinan vegin og fyribils til 30. september 2009 við møguleika fyri føstum starvi.

Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a um**
- journalarbeiði
- móttøka og telefonmóttøka
- vanligt skrivstovuarbeiði so sum bókhald og skrivarauppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur**
- útbúgving sum skrivstovufólk
- drúgvar royndir frá líknandi arbeiði
- evnir at arbeiða við nógvum tingum í senn
- gott yvirlit
- góð samstarvsevnir
- góðan førleika at orða seg bæði munnliga og skrivliga á føroyskum
- góðan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leið-ara á HTM, telefon 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn ella við teldu-posti til htm@almannastovan.fo

Umsóknarfreist: mánadagin 15. september 2008, kl. 14.00.

KREA

---

HTM HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN



## Ergoterapeutur ella Fysioterapeutur
### til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

**Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur, og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

Eitt fyribilsstarv sum ráðgev-andi og málsviðgerandi Ergo-terapeutur ella Fysioterapeutur er leyst at seta beinan vegin og fyribils til 31. juli 2009 við møguleika fyri føstum starvi.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, men kann onnur arbeiðstíð avtalast.

**Ynskiligt er at umsøkjari hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almanna-lóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skriftliga
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn ella við telduposti til htm@almannastovan.fo

**Umsóknarfreist**
mánadagin 08. september 2008.

KREA